## Barnafagnaður í Klaksvík

Í dag er barnafagnaður í Klaksvík, sum í samband við at kommunan fyllir 100 ár í á verður skipaður øðrvísi enn undanfarin ár. Skráin er henda: Skrúðgonga við øllum børnum og vaksnum í ansingarskipanini hjá Klaksvíkar Kommunu fer saman við Klaksvíkar Hornorkestri av sandinum kl. 14.30 niðan í Djúpumýru. Á vøllinum er pallur settur upp, har ymiskt undirhald verður fyri børnunum. Millum annað fer Karl Martin at syngja saman við børnunum, og Finn og co. fara at undirhalda. Silvi, Bassi og Nósi fara eisini at seta sín dám á.



# Tavan havt 15 miljónir í avlopi í 4 ár



*Tavan í Leirvík hevði 2,5 miljónir krónur í avlopi eftir skatt í 2007. Árini 2004, 2005, 2006 og 2007 hevur virkið havt tilsamans 15 miljónir krónur í avlopi – eftir skatt*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Á Tavuni í Leirvík hava tey havt úr at gera, síðan virkið keypti fyrstu gulllaksalastina í hesi vertíðini. - Vit hava arbeitt alt, sum vit hava megnað og hava arbeitt næstan hvønn leygardag eisini. Eini 20-25 fólk eru á hvørji vaktini, og hvør vaktin hevur verið 10 tímar long, sigur stjórin, Jóan Magnus Rasmussen, sum er væl nøgdur við árið í fjør**

FISKAVIRKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Jóan Magnus Rasmussen, stjóri í Tavuni, vónar ikki, at tað verður so galið hjá gulllaksaskipunum, at tey noyðast at gevast. – Tað vildi verið ein óheppin og ólukkulig støða, sigur hann*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Sólskinssøgurnar í fiskivinnuni eru ikki so nógvar í hesum tíðum, hvørki á sjógvi ella á landi.

Fiskiflotin hevur ógvuliga truplar tíðir, nú tað er vorðið so kostnaðarmikið at gera skipini út. Høgu oljuprísirnir eru við at leggja allan flotan lamnan, og einki verður gjørt frá politiskari síðu til at byrgja upp fyri teirri kreppu í fiskivinnuni, sum við stórum lopum stundar til.

Politiski myndugleikin sigur, at fríu marknaðarkreftirnar mugu sleppa at ráða, so vit fáa neyðugu tillagingina í fiskiskipaflotanum. Men eingin hevur nakað seriøst boð upp á, hvussu ein tillaging kann koma at síggja út. Samstundis liggja politisk høft á fiskiskipavinnuni, har ísfiskaskipini er tvungin til at landa meginpartin av veiðini í Føroyum. Virking av botnfiskaveiðini undir Føroyum er heldur ikki loyvd umborð á skipunum, sum í mesta lagi kunnu kryvja og avhøvda fiskin umborð.

Onnur lond royna at byrgja uppfyri stórum konjunkturbroytingum, so hesar ikki fáa alt ov álvarsligar avleiðingar fyri samfelagið. Í Føroyum stingur politisku myndugleikin høvdið niður í sandin og sigur, at sonevndu fríu marknaðarkreftirnar mugu sær ráða.

Um hetta er rætti hátturin at handfara trupulleikarnar, sum fiskiskipavinnan er komin í, fer tíðin at vísa.

### Ein sólskinssøga

Meðan ein partur av ísfiskaflotanum liggur bundin við bryggju, og øll útlit eru til, at fleiri og fleiri skip verða løgd, gongur eisini striltið hjá teimum stóru feløgunum, sum hava sítt starv í fiskavirkisvinnuni, samstundis sum tey hava keypt sær skip og soleiðis hildu seg hava tryggjað sær ráfiskagrundarlag undir sínum framleiðsluvirksemi.

Í hesi truplu tíðini, sum fiskiflotin og fiskavirkisvinnan eru í, er kortini onkur sólskinssøga.

Gulllaksavirkið Tavan í Leirvík er á hvørjum ári ein av okkara sólskinssøgum.

Nú árið í fjør er endaliga uppgjørt, er greitt, at avlopið eftir skatt í 2007 er 2,5 miljónir krónur.

Taka vit tey trý árini fyri 2007, hevði Tavan í 2004 eitt avlop upp á 1,6 miljónir krónur, og í 2005 var avlopið 3,4 miljónir krónur. Besta árið nakrantíð hjá virkinum var árið 2006, tá Tavan hevði heilar 7,5 miljónir krónur í avlopi – eftir skatt.

Leggja vit saman undanfarnu fýra árini, hevur virksemið hjá Tavuni í Leirvík givið heilar 15 miljónir krónur í avlopi tilsamans.

Árið 2006 var soleiðis nógv tað besta árið hjá virkinum nakrantíð.

### Stjórin nøgdur

Jóan Magnus Rasmussen, stjóri á Tavuni, er væl nøgdur við árið í fjør, og hann er eisini væl nøgdur við gongdina higartil í ár.

- Jú, eg haldi, at hetta sær bara gott út. Vit hava langtíðaravtalur um levering av gulllaksafarsi til keyparar í Noregi, Skandinaviu annars og Onglandi, sum fevna um alt árið. At kalla øll framleiðslan er soleiðis seld væl fram í tíðina.

Stjórin vísir á, at Tavan hevur latið skipunum 3,40 krónur fyri kilo av gulllaksi í summar, og hetta er á leið sami prísur, sum skipini fingu seinastu vertíð og heldur frægari prísur enn árið fyri.

- Fyrimunurin við langtíðaravtalum er, at tú yvir eina longri tíð veitst, hvat tú hevur at halda teg til.

Nú oljan er vorðin so dýr, samstundis sum eitt nú matvøruprísir sum heild eisini eru øktir, eru fleiri sum spyrja, hvussu tað ber til, at fiskaprísirnir ikki eisini eru øktir.

- Ja, tað kann undra, at so er, men væntandi fara fiskaprísirnir eisini at kvinka uppeftir, sum tíðin gongur. Vanliga eru prísirnir á feskari vøru meira skiftandi – upp og niður - enn prísirnir á virkaðari vøru. Jú, meira vøran er virkað, er hugsandiw, at lopini í prísunum ikki eru so stór, men at prísirnir eru meira støðugir og broytingarnar ikki so ógvusligar.

Sum heild heldur Jóan Magnus, at fiskamarknaðurin "reagerar" ógvuliga seint upp á lidnar fiskavørur, um samanborið verður við feskar fiskavørur og matvørur annars.

### Góð veiða

Tavan tók ímóti fyrstu gulllaksalastini 21. apríl í